## Bárður um §266b

- Eg haldi, at tað er eitt mál, sum hevur fingið alt, alt ov nógva umrøðu - innanlands og tíverri eisini uttanlands. Løgtingslimirnir eru ikki ósamdir um málið, men um fylgjurnar, sum møguliga kunnu koma av hesari lógarbroyting. Tað hevur eisini fingið avleiðingar fyri mín flokk, Sambandsflokkin, tá ið málið ikki fekk ta vend, sum nakrir ynsktu. Eg haldi, at vit skulu taka fólkaræði í álvara og hyggja frameftir.

## Bárður um HM í hondbólti

- Tú heldur per definitión við teimum norðurlendsku liðnum. Fyrr helt eg altíð við Svøríki, tí at teir vóru so góðir, og tí at teir hava bláar og gular búnar eins og VÍF. Men teir hava merkt sviðan av, at teir ikki skiftu leikararnar út í nógv ár. Nú eru teir ikki so góðir longur. Í hesari HM kappingini hava eg hildið við Danmark og Ísland. Tað var tó harmiligt, at tey skuldu møtast so tíðliga í kappingini.

2007 GERMANY HANDBALL WORLD CHAMPIONSHIP

# Fíggjarmálaráðharrin hev

**Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, er Løgtingslimur og landsstýrismaður fyri Sambandsflokkin. Tá ið hann gjørdist landsstýrismaður, noyddist hann at trampa niður við hondbóltinum. Hann var annars ein av okkara fremstu málverjum tá. Nú er hann tó aftur at finna millum stengurnar hjá VÍF**




Sosialurin

## Ítróttarprofilurin



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Fíggjarmálaráðharrin Bárður Nielsen hevur staðið í mál fyri VÍF seinastu dystirnar í Atlantic Airways kappingini. Hann hevur annars ikki spælt nógv seinastu árini, síðani hann gjørdist landsstýrismaður, men nú er hann aftur farin at spæla á hægsta stigi.

Møguleikin kom, tá ið Dejan Lacok fekk ein skaða, og tí ringdu teir til Bárð og bóðu hann koma við til dyst.

Bárður og Eli Müller kappast nú um plássið millum stengurnar.

### Vestmenningar spæla hondbólt

Bárður byrjaði at spæla hondbólt sum 8 – 9 ára gamal. Tá vóru umstøðurnar til hondbólt heilt øðrvísi.

– Eg var ofta á vøllinum sum barn, men eg byrjaði at venja sum 8 – 9 ára gamal. Tá spældi vit uttandura. Umstøðurnar vóru heilt øðrvísi tá. Høllin var ikki komin. Tað vóru einans tær eldru deildirnar, sum spældu innandura. Tá hevði VÍF heimavøll á Skála, sigur Bárður.

Bárður var 14 ára gamal, tá ið høllin kom. Hann sigur, at spælið hevur ment seg nógv, síðani tað er komið undir tak.

– Hondbóltsspælið er nógv broytt í mínari tíð. Tá ið tú spælir úti, verður spælið hareftir. Menn tveittu seg ikki eftir vøllinum, og ferðin var ikki høg. Vit spældu eisini í øllum veðri. Nú hevði tað verið óhugsandi at spælt úti í nógvum vindi. Men tá vistu vit ikki um nakað betri, sigur Bárður

Í Vestmanna er tað, nú eins og fyrr, ein sjálvfylgja, at tú spælir hondbólt og hevur áhuga fyri VÍF.

– Tað er sjávskrivað, at tú fylgir við hondbólti, tá ið tú ert vestmenningur. Tað er mestsum óvanligt, um fólk ikki luttaka í hondbólti, sigur Bárður.

### Landsliðið hevur manglað

Bárður hevur verið vitni til, at føroyska hondbóltsspælið hevur ment seg nógv. Men hann hevur eisini sæð, at føroyingar als ikki hava megnað at fylgt við granna-londunum. Bárður heldur seg vita, hvør orsøkin er til tess:

– Landsliðið hevur manglað øll hesi árini. Øll árini, sum eg havi verið virkin, hevur einki støðugt A-landslið verið. Eg havi verið óheppin í so máta, men eg havi tíbetur roynt at spæla í Evropa Cup við VÍF. Eg sakni eitt landslið, tí at tað hevði verið ein gularót fyri hondbóltsspælarar. Í 70´unum og 80´unum spældi Føroyar nakrar landsdystir móti Íslandi. Tá var so at siga eingin munur millum liðini, men nú hevur Ísland klárað at komið heilt til fjórðingsfinaluna í HM, meðan vit als ikki luttaka í altjóða kappingum, sigur Bárður.

### Rástyrkin manglar

– Royndirnar hjá teimum føroysku leikarunum eru ov fáar. Nú havi eg hugt at HM kappingini í manshondbólti í sjónvarpinum. Har sært tú, at størsti munurin á føroyskum og altjóða hondbóltsleikarum er likamsstyrkin. Føroyingarnir mangla rástyrkina, sigur Bárður.

Bárður endaði í málinum sum ungur, og har hevur hann verið verandi. Summi halda fyri, at hondbóltsmálverjar eru eitt sindur ørir, tá ið teir stilla seg fyri bóltarnar, sum verða smekkaðir eftir málinum.

– Eg ræðist ikki bóltin. Tað havi eg ongantíð gjørt. Tá ið tú ert heitur, fært tú ikki ilt av einum bólti, hóast tú verður raktur beint á snútin, sigur Bárður.

### Nógv góð hondbólts-upplivilsi

Bárður hevur mangan verið føroyameistari við VÍF. Tað eru